# Gera súkklubreyt á Vegnum Langa

SÚKKLUBREYT
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nú verður súkklubreyt gjørd á Vegnum Langa í Havn. Hesa avgerð hevur Tórshavnar Kommuna tikið.

Seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at leggja fjarhitarør í ovaru síðu á Vegnum Langa/Óluvugøtu yvir móti Berjabrekku.

Í sambandi við hetta arbeiði hevur kommunan gjørt av at leggja eina regnvatnsleiðing eisini og at gera súkklubreyt og gongubreyt oman á aftur rørveitingarnar.

Heðin Mortensen, borgarstjóri sigur, at tað ber væl til at hava gongufólk og súkklur á somu breyt, men tað krevur, at gongubreytin er eitt sindur breiðari, enn vanligt er.

Tað er byggifelagið Sp/f Andreas Berg, sum ger arbeiðið við umleggingini av vatnleiðingini, gongubreytini og súkklubreytina. Alt hetta arbeiði verður gjørt fyri slakar 2,4 mió kr.

Býráðið samtykti málið uttan atkvøðugreiðslu á fundi hóskvøldið. Men tað var kortini ikki ein fullsamd teknisk nevnd, sum mælti til at samtykkja málið. Meirilutin Jógvan Arge, Sjúrður Olsen, Hildur Eyðunsdóttir og Katrin Dahl Jakobsen samtyktu, at gongubreyt skuldi gerast saman við súkklubreyt, meðan minnilutin Høgni Mikkelsen mælti til at gera eina gongubreyt við vanligari breidd.

# Ársfundur hjá Ferðslutrygd

Ársfundurin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd verður í morgin hósdagin á Hotel Føroyum.

Á fundinum heldur stjórin í Landsverk, Oyvindur Brimnes, fyrilestur við heitinum »Frá trupulleika til loysn«. Eftir fyrilesturin, verður sjálvur ársfundurin við m.a. ársfrágreiðing, val av limum til starvsnevndina - allir 5 standa fyri vali hesaferð. Á ársfundinum verður eisini verkstova, har limirnir fáa høvi til at siga sína áskoðan um, hvussu raðfest eigur at vera, tá ið arbeitt verður við ferðslutrygdarspurningum.

Viðvíkjandi ferðslutrygdararbeiðinum sum heild staðfestir Ferðslutrygd, at nú Nullhugsjónin væntandi verður sett inn í endamálsorðingina í ferðslulógini, koma vit eitt stórt fet frameftir.



## Ársroknskapur 2005

**P/F FÏROYA LÍVSTRYGGING**

### Rakstrarroknskapur 2005

| | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld tilsamans | 217.682.632 | 205.116.116 |
| Endurtryggingargjøld | -10.016.931 | -8.398.448 |
| Tryggingargjøld netto | 207.665.701 | 196.717.668 |
| Inntøkur av íløguognum | | |
| Fastogn | 681.660 | 691.660 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 72.876.694 | 74.044.955 |
| Inntøkur av íløguogn, tilsamans | 73.558.354 | 74.736.615 |
| Kursregulering virðisbrøv | 59.010.007 | 24.906.235 |
| Inntøkur av íløguognum tilsamans | 132.568.361 | 99.642.850 |
| Tryggingarveitingar | | |
| Útgoldnar veitingar | -70.424.355 | -63.652.231 |
| Endurtryggjarans partur | -291.636 | 3.406.722 |
| Tryggingarveitingar netto | -70.715.991 | -60.245.509 |
| Tryggingartekniskar avsetingar | | |
| Hækking í tryggingartekniskum avsetingum brutto | -191.629.565 | -178.159.242 |
| Broyting í endurtryggjarans parti | 5.162.810 | 4.244.562 |
| Hækking av tryggingartekniskum avsetingum netto | -186.466.755 | -173.914.680 |
| Tikið úr (+) lagt í (-) bonusútjavningargrunn | -49.494.139 | -32.043.009 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -848.104 | -436.020 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -5.815.653 | -5.407.093 |
| Løn, eftirløn og ómaksløn | -9.539.925 | -8.870.233 |
| Rakstrarútreiðslur áðrenn avskrivingar | -16.203.682 | -14.713.346 |
| Avskrivingar av EDV-útgerð, innbúgvi og akførum v.m. | -3.540.077 | -3.629.672 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi | -19.743.759 | -18.343.018 |
| Útreiðslur av íløguognum | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -4.073.830 | -3.108.171 |
| Rentuútreiðslur | -733.281 | -733.438 |
| Rakstur av fastogn | -1.015.315 | -1.080.444 |
| Aðrar útreiðslur | 6.944 | 137.686 |
| Avskrivingar av fastogn | -138.009 | -138.009 |
| Útreiðslur av íløguognum tilsamans | -5.953.491 | -4.922.375 |
| Fluttar íløguinntøkur (-) | -5.731.185 | -4.532.601 |
| ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI | 2.128.742 | 2.359.325 |
| Fluttar íløguinntøkur (+) | 5.731.185 | 4.532.601 |
| Óvanligar inntøkur/útreiðslur | 0 | -363.351 |
| ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT OG AVGJØLD | 7.859.926 | 6.528.575 |
| Skattur og avgjøld | -1.444.529 | -588.393 |
| RAKSTRARÚRSLIT | 6.415.398 | 5.940.182 |

### Fíggjarstøða tann 31. des.

| OGN | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Íløguogn | | |
| Fastogn | 15.172.264 | 14.390.188 |
| Partabrøv í atknýttum felag | 20.000.000 | 0 |
| Fíggjaríløgur | | |
| Partabrøv | 266.411.893 | 83.983.439 |
| Lánsbrøv | 1.494.504.176 | 1.502.972.438 |
| Útlán | 25.264.540 | 35.280.371 |
| Innlán | 154.373.321 | 84.525.188 |
| Fíggjaríløgur tilsamans | 1.940.553.930 | 1.706.761.435 |
| Íløguogn tilsamans | 1.975.726.194 | 1.721.151.623 |
| Áogn | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum | 4.455.673 | 7.168.220 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum | 2.224.095 | 3.703.402 |
| Onnur áogn | 375.454 | 96.845 |
| Áogn tilsamans | 7.055.222 | 10.968.467 |
| Onnur ogn | | |
| Innbúgv, edv-útgerð, akfør v.m. | 6.281.310 | 7.464.283 |
| Onnur ogn tilsamans | 6.281.310 | 7.464.283 |
| Tíðaravmarkingar | | |
| Renta tilgóðar | 15.221.196 | 21.355.850 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 2.100.966 | 1.982.246 |
| Tíðaravmarkingar tilsamans | 17.322.162 | 23.338.096 |
| OGN TILSAMANS | 2.006.384.888 | 1.762.922.469 |

| SKYLDUR | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Eginogn | | |
| Partapeningur | 500.000 | 500.000 |
| Tiltaksgrunnur | 86.107.858 | 79.692.460 |
| Eginogn tilsamans | 86.607.858 | 80.192.460 |
| Ábyrgdarpeningur | 25.000.000 | 25.000.000 |
| Tryggingartekniskar avsetingar | | |
| Bruttoavsetingar | 1.769.369.247 | 1.577.739.683 |
| Endurtryggjarans partur | -10.947.934 | -5.785.124 |
| Tryggingartekniskar avsetingar netto | 1.758.421.313 | 1.571.954.559 |
| Tiltaksviðurgjald | 6.856.385 | 7.972.983 |
| Avsett til bonusútjavning | 111.242.995 | 61.748.856 |
| Tryggingartekniskar avsetingar netto tilsamans | 1.876.520.693 | 1.641.676.398 |
| Skuld | | |
| Frammanundangoldin tryggingargjøld | 15.484.380 | 14.021.855 |
| Skattur | 813.200 | 0 |
| Onnur skuld | 1.958.756 | 2.031.756 |
| Skuld tilsamans | 18.256.336 | 16.053.611 |
| SKYLDUR TILSAMANS | 2.006.384.888 | 1.762.922.469 |

reproz